# Sóley og Sveinur vóru best

**Aftur í ár endaði hondbóltsárið við einum gallakvøldið, har bestu leikararnir farna kappingarárið skuldu heiðrast**

GALLAKVØLD

*orð: Jákup Mørk*
*myndir: Álvur Haraldsen*

Tað hevur verið fastur siður seinnu árini, at hondbóltsárið verður endað við stórum gallakvøldið. Soleiðis var eisini í ár, og hesa ferð var tað follið Kyndli í lut at skipa fyri kvøldinum.

Hetta gekk fyri seg á Platform í Havn, og hópur av íðkarum úr ymsu ítróttafeløgunum høvdu sett hvørjum øðrum stevnu hetta kvøldið, soleiðis at takast kundi saman um árið undir meira óformligum umstøðum enn tær, sum annars eru galdandi á vøllinum.

## 19 ár og bestur

Hæddarpunktið á kvøldinum var sjálvandi handanin av ymsum steypunum sum tekin um, hvørji høvdu staðið seg best farna árið. Umframt at toppskjúttarnir fingu steyp fyri síni avrik, høvdu leikarar í ymsu feløgunum eisini atkvøtt fyri, hvønn tey hildu vera bestan á ymsum plássum.

Ikki minst tóktist spenningurin vera stórur um, hvør skuldi fáa heitið sum ársins leikari hjá ávíkavist kvinnum og monnum. Hjá kvinnunum gjørdist tað hesa ferð Sóley Mikkelsen, sum sostatt er tann fyrsta, sum fær hetta heitið tvær ferðír. Hon vann eisini hetta heitið fyri tveimum árum síðani.

Hjá monnunum vóru ivaleyst fleiri um boðið, men tá alt kom til stykkis, var tað ein av teimum heilt ungu, sum fekk heiðurin. Sveinur Justinussen fekk í fjørð heitið sum ársins stjørnuskot, og í ár varð hetta so uppgraderað til ársins leikara, og tað man ikki vera eiti á heiður at fáa hjá einum somikið ungum leikara. Bert 19 ára gamal skuldi hann í øllum førum átt nógv góð hondbóltsár eftir, so neyvan er tað seinasta ferðin, at hann er farin á pallin eftir hesum steypinum.

## Stjørnuskot úr Neistanum

Spenningurin um stjørnuskotini plagar vanliga eisini at vera stórur, og her lagaði tað seg soleiðis, at talan í báðum førum gjørdist um vongspælarar hjá Neistanum. Ragnar Stakksund hevur í ár veruliga sannført um, at hann eigur at teljast millum bestu vongspælarar í landinum, og tað sama hevur kvika Lív Sørensen gjørt á kvinnusíðuni.

Útlendingar vórðu aftur í ár bestu føroysku venjararnir, og vórðu tað ikki óvæntað teir báðir gullvinnararnir, Aivaras Daugis úr VB og Costin Dumitrescu úr StÍF, sum fingu hendan heiðurin.

Á verjusíðuni fekk Sóley Mikkelsen umframt heitið sum ársins leikari eisini heiðurin sum besti verjuleikarin, meðan tað hjá monnunum stóð á jøvnum millum Finnur Hansson og Hans Áka Dal-Christiansen, sum báðir hava verið við Kyndli í vetur. Steypini í álopspartinum vórðu latin til tey bæði, sum eisini vóru bestu málskjúttarnir í kappingini. Nevnliga Daivu og Dragisa.

Málverjarnir, sum vórðu mettir sum tey bestu, vóru greipuvinnandi Daiva Ylaite úr VB og Johan Danielsen hjá Kyndli, sum var meistari fyri steypasigrinum í ár.

Og at enda vórðu ársins dómarar so eisini avdúkaðir. Her gjørdist talan aftur í ár um steyp til Hannis Wardum. Í fjør fekk hann hendan heiðurin saman við beiggjanum, Una Wardum, men í ár dømdi hann saman við Eyðuni Samuelsen, og eftir øllum at døma hevur hetta ikki gingið minni væl.

Tað kann væl vera, at onkur vildi havt býtið av ymsu steypini nakað øðrvísi, men hvussu er og ikki, so setti gallakvøldið enn einaferð eitt bæði virðiligt og hugnaligt punktum fyri kappingarárið. Og lítið er at ivast í, at tey flestu av teimum møttu eisini teljast millum teirra, sum aftur tørna út fyri feløg síni til komandi kappingarár.



*Stjørnuskot í fjør. Tann besti í ár. Sveinur Justinussen úr StÍF varð leygarkvøldið kosin at vera besti leikarin í føroyskum manshondbólti*



*Sum hin fyrsta er Sóley Mikkelsen tvær reisur kosin sum besti leikarin í føroyskum kvinnuhondbólti. Umframt hendan heiðurin varð hon eisini kosin at vera besti verjuleikarin*



*Gallakvøldið setti aftur í ár eitt bæði virðiligt og hugnaligt punktum fyri kappingarárinum*

## Gallakvøld 2003

Ársins venjarar
kvinnur: Aivaras Daugis, VB
menn: Costin Dumitrescu, StÍF

Ársins verjuleikari
kvinnur: Sóley Mikkelsen, VÍF
menn: Finnur Hansson & Hans Áki Dal-Christiansen, báðir úr Kyndli

Ársins áleypari
kvinnur: Daiva Toumaite, VB
menn: Dragisa Stojovic, Tjaldur

Ársins málverji
kvinnur: Daiva Ylaite, VB
menn: Johan Danielsen, Kyndil

Ársins Stjørnuskot
kvinnur: Lív Sørensen, Neistin
menn: Ragnar Stakksund, Neistin

Ársins leikari
kvinnur: Sóley Mikkelsen, VÍF
menn: Sveinur Justinussen, StÍF

Ársins dómarar
Hannis Wardum & Eyðun Samuelsen, Kyndil

Ársins toppskjútti
kvinnur: Daiva Toumaite, VB
menn: Dragisa Stojovic, Tjaldur




FØROYA LÆRARASKÚLI

## Læraraútbúgvingin

Vilt tú vera lærari?

Nú er greitt at søkja á Læraraskúlan eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501), teldupostur: flsk@flsk.fo

Skrivstovan er opin
kl. 8.00–16.00.

Treytin fyri upptøku á læraraútbúgvingina er studentsprógv, HF-prógv ella prógv á líknandi stigi.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. juni.

LÆRARAÚTBÚGVINGIN
*– Ein útbúgving fyri lívið*

FØROYA LÆRARASKÚLI

## Námsliga útbúgvingin

Vilt tú vera pedagogur?

Nýggjur flokkur verður tikin upp eftir summarfrítíðina.

Umsóknarbløð eru at fáa á Læraraskúlanum (tlf. 313501), teldupostur: flsk@flsk.fo

Skrivstovan er opin kl. 8.00–16.00.

Treytirnar fyri upptøku á **námsligu útbúgvingina** eru, at umsøkjarin umframt at hava gingið í 9 ár í skúla, hevur staðið HF-prógv, studentsprógv, hægri handilsskúlaprógv, hevur lærlingaútbúgving, ella kann prógva samsvarandi kunnleika.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur starvast í dag- ella bústovni í minsta lagi 1/2 ár.

Umsóknirnar skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 10. juni.

NÁMSLIGA ÚTBÚGVINGIN
*– Ein útbúgving fyri lívið*

## Frá Vágs kommunu

Vágs kommuna letur upp nýggjan dagstovn í august mánað 2003.

Stovnurin er settur saman av vøggu- og barnagarðsstovu.

Í hesum sambandi fer innskriving av børnum fram á telefon 37 30 24 og 22 94 82.

Seinasta freist er 1. juni 2003.

**Vágs kommuna**
**Mentanarnevndin**

**Vegna**

## Dolphin Drilling

leita vit eftir 3 húsum/íbúðum í Tórshavn til leigu skjótast gjørligt. Helst frá 1. mai 2003.

*Dolphin Drilling eigur boriskipið, sum skal bora í summar og í hesum sambandi er tørvur á bústøðum til starvsfólk teirra.*

Vinarliga ringið til

TOR SHIPPING

**tlf. 31 85 31**

## Sveisiarbeiði

Eg havi byrjað mína egnu fyritøku har alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og alminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði.

**Hevur hetta tín áhuga ring nátt sum dag.**
**Tlf. 422127/220957**
**LB Service**
v/ Lars Bisgaard

## Frítíðarskúlin í Vági

Børn verða innskrivaði til skúlaárið 2003/2004.

Seinasta freist er 1. juni 2003.

**Frítíðarskúlin í Vági**
**Telefon 22 94 82**

## Starvsfólk til Café-in v/ Streymin

Søkt verður eftir einum starvsfólki til Café-ina/barrina at arbeiða í skiftivaktum.

Viðkomandi skal vera fyltur 18 ár.

**Café-in v/ Streymin tlf. 422033/223232**

## M/B Karin KG 716

til sølu um hóskandi boð fæst. Øll loyvir fylgja við.

Báturin hevur verið til høvuðssýn í mars 2003.

**Tlf. 456787 ella 259362**

## Góðir brúktir bilar

| | |
|---|---|
| **Nissan Almera 2,2 Diesel Turbo, Elegance** gráur, árg. 2002, 4 hurðar, km. 7.000 **180.000** | **Opel Astra 1.7DT** brúnur, árg 1996, 4 hurðar, km. 156.000 **75.000** |
| **Peugeot 106 XR 1.4** reyður, árg. 1997, km. 80.000 **69.000** | **Opel Astra 1,7 DT Van** bláur, árg 1998, 5 hurðar, km. 82.000 v/mvg **78.000** |
| **Peugeot 206 CC 1.6** árg 2001 **155.000** | **Opel Astra 1.6 Elegance Station Car** gráur, árg 2001, km. 21.000 **165.000** |
| **Peugeot 306 Diesel** grønur, árg 1996, km. 155.000 **75.000** | **Opel Vectra 2.0 Aut.** brúnur, 4 hurðar, km. 195.000 **57.000** |
| **Peugeot 306 Diesel 1.9 v/aircon.** bláur, árg 1999, 4 hurðar, km. 61.000 **115.000** | **Toyota Avensis Sol 2.0 DTI** grønur, árg 1998, km. 185.000 **130.000** |
| **Peugeot 406 ST 2,0 HDI** morreyður, árg 1999, 4 hurðar, km. 140.000 **130.000** | **Ford Escort 1.6 St. Car** reyður, árg 1996, 5 hurðar **65.000** |
| **Peugeot 406 TS6 3.0 V6 v/klimaanleggi** gráur, árg 2001, 4 hurðar, km. 57.000 **210.000** | **Ford Escort 1.8** svartur, árg 1998, 5 hurðar, km. 123.000 **85.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.1 DT** bláur, árg 1998, km. 153.000 **127.000** | **Ford Escort 1.8 Diesel** grønur, árg 1995, 4 hurðar, km. 158.000 **65.000** |
| **Peugeot 406 ST 2.0 Hdi v/aircon.** vínreyður, árg 1999, 4 hurðar, km. 120.000 **154.000** | **Saab 900i, aut** grønur, árg 1987, 4 hurðar, km. 92.000 **25.000** |
| **Peugeot 607 Ebene 2.2 Hdi aut. v/klimaanl.** gráur, árg 2001, 4 hurðar, km. 105.000 **259.000** | **Toyota Corolla 1.3** hvítur, árg 1996, km. 105.000 **67.000** |
| **Opel Corsa 1.7 DTi** grønur, árg 2002, 5 hurðar **132.000** | **Ford Mondeo DT 1,8 Diesel Turbo Station Car** hvítur, árg 1995, km. 135.000 **95.000** |
| **Opel Astra 1.7DT St. car** reyður, árg 1999, 5 hurðar **115.000** | **Ford Escort Van 1.8 D** gráur, árg 2000, 3 hurðar, km. 74.000 **68.000** |
| **Opel Astra 1.7DT** bláur, árg 1996, 5 hurðar, km. 159.000 **52.000** | |

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

**P/F Meinhardt Arge**
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

**Søkt verður eftir hjálparkokkum tænarum og servitrisum at byrja skjótast gjørligt.
Løn eftir avtalu.**

**Áhuga kunnu ringja á tlf. 319696 / 219696**

RIO BRAVO RESTAURANT